# Santa Mortan

*Mær gav Santa Mortan tjúgunda kvøldið jóla*

20 stútir, nú eru jólini úti,
19 kvígur, nú munnu jólini líða,
18 stakkar, nú munnu jólini lækka,
17 kjólar, gav hon teim til jóla,
16 hindir, allar vóru blindar,
15 svanir, allir vóru trænir,
14 ostar, fullu so væl í tostar,
13 húðir, strekkja við sínar búðir,
12 dreingir, bæði við reip og streingir,
11 bukkar, fullu so væl í tokkar,
10 tunnur bjór, tað var teirra dreingja kór,
9 langskip við rá,
8 gangarar grá,
7 silvurskálir,
6 dúvur blá, sótu mær íhjá,
5 fæ,
4 fár,
3 flikki,
2 gæs,
1 fjøður av teim fugl',
   ið væl kundi at flúva.